# Skal “hate crime” vera loyvd í Føroyum?

DORTHE PEDERSEN

Tá beiggi mín sum 22-ára gamal segði okkum í familjuni frá, at hann var samkyndur, gjørdist eg sera glað hansara vegna og var errin av honum, tí hann var so djarvur og strálaði av sjálvsáliti og dirvi. Seinni, tá henda spontana gleðin hevði lagt seg, byrjaðu ótta-fullir tankar at stinga seg upp, tí væl visti eg, at samkynd ikki verða eins og væl viðfarin av øllum. Og als ikki í Føroyum, sum vit hava verið vitni til gjøgnum longri tíð. Tað er nívandi og hart at leggja oyra til sera niðurgerandi og hatsku orðingarnar, enntá eisini frá landsins ovastu, mótvegis teim samkyndu. Serliga aftan á seinasta tilburðin, sum eg sum systir at einum samkyndum leingi havi verið bangin um: at ein samkyndur varð álopin, háðaður og bukaður orsaka av, at hann var samkyndur. Og verri enn tað: hann hevur aftan á hesa meiningsleysu og ómenniskjasligu viðferð verið ákærdur fyri at vera “grenjutur” og “sjálvur at hava havt skyldina”! Tað, at løgreglan ikki hevur heimild at gera nakað í hesum málið, vísir klárt og týðiligt, at tey samkyndu hava hjálp fyri neyðini. Tað er tí við djúpastu samkenslu við familjuni hjá Rasmusi og við tonkunum um framtíðina fyri okkara samkyndu í Føroyum, at eg eggi til, at lógin MÁ endurskoðast.

Í sendingini “62 norður” hjá ÚF frá týsdegnum 10.10.06, har Alfred Olsen var gestur, ringdi Mortan Rasmussen inn og segði, at høvdu álopini á Rasmus verið framd í USA, hevði tað verið viðgjørt sum “hate crime”. Tíverri gjørdu hvørki journalisturin ella Alfred Olsen nakað burtur úr hesum fyribrigdinum, møguliga tí tey ikki høvdu hoyrt um tað fyrr. Hugtakið ”Hate Crime” ella ”haturs ágangur” skilir seg frá øðrum lógarbrotum við tað, at orsøkin til brotsgerðina er hatur mótvegis einum einstøkum minniluta. Offrið er sostatt umboð fyri nakað, sum gerningsmaðurin er ímóti, og orsøkin til brotsgerðina hevur harvið einki við persónlig viðurskiftir millum offrið og gerningsmannin at gera. Við øðrum orðum er talan um fullkomiliga meiningsleysan ágang.

Beiggi mín lesur fyri tíðina í Danmark. Sum støðan er í Føroyum nú, hevur hann sjálvsagt ongan hug at flyta aftur. Eiheldur hevur hann hug at stegða leingi heima í frítíðini, tí sum hann sigur “hetta er ikki eitt verandi stað fyri meg”. Er tað hetta, tit vilja uppnáa: at okkara samkyndu flyta av landinum?! Tit politikarar, sum í sínari tíð atkvøddu nei til, at tey samkyndu skuldu nevnast í antidiskriminatiónslógini? At viska tey samkyndu burtur, at fortreingka tey, ber kanska til í eitt stutt tíðarskeið. Men vit eru mong, sum ikki vilja finna okkum í, at hesin minnilutabólkurin verður goymdur og gloymdur, tí tey samkyndu hava altíð verið, eru og fara altíð at vera ein (minniluta)partur av einum og hvørjum samfelag! Hóast vit ikki eru samd um etiskar spurningar, eiga vit at hava virðing hvør fyri øðrum.

Hetta er tí ein innilig áheitan til tykkum politikarar um at ganga uppskotinum hjá Finni Helmsdali um at broyta antidiskriminatónslógina á møti!

# Sjálvandi skulu vit við lóg verja minnilutabólkar

INGA ELLINGSGAARD



Meðani eg var uttanlands og ferðaðist, hendi syrgiligi tilburðurin við Rasmusi, at hann umframt at verða happaður fyri at verða samkyndur, eisini var hóttur eftir lívinum.

Tíbetur eru nógv fólk, sum eisini gera vart við seg í bløðunum - har er nógv gott skrivað.

Eg havi ilt við at trúgva, at meirilutin av okkara fólki skal hava nakað ímóti, at vit við lóg tryggja, at happing av samkyndum verður bannað. Tað er tað, málið snýr seg um.

Vit minnast, hvussu ófatuliga long tíð gekk, áðrenn vit fingu javnstøðulóguna viðtikna. Eisini tá regnaði við skriftstøðum úr Bíbliuni sum argumentatión móti, at lógin varð viðtikin.

Tá Kvinnufelagið síðst í 80-unum fór undir at stovna Kvinnuhúsið, var eisini sagt, at hetta var fullkomuliga óneyðugt í Føroyum, tí føroyskar kvinnur høvdu tað so gott. Her var ongin, sum bukaði kvinnur og børn. Men tað vísti seg skjótt, at Kvinnuhúsið fekk úr at gera, og at føroyskar kvinnur og børn teirra ikki hava tað pettið betri enn í londunum kring um okkum. Tørvurin var her og størri enn væntað.

At misnýtsla av børnum, incest, eisini var í Føroyum, kundi heldur ikki passa. Men tað hevur víst seg, at á hesum øki er líka so galið, sum í øðrum londum.

Vit eru ikki pettið annarleiðis enn fólk í øðrum londum og hava somu trupulleikar sum tey.

At fólk eru samkynd, kunnu tey ikki sjálv gera nakað við, soleiðis eru tey skapt. Tað eiga vit at góðtaka uttan víðari. Tað eru ikki tey, sum eru trupulleikin!

Hví skal hetta verða ein trupulleiki hjá øðrum?

Hvat viðkemur sexualiteturin hjá øðrum menniskjum okkum?

Er eitt menniskja ikki eitt menniskja uttan mun til sín sexualitet?

Hvat er hetta fyri ein býtt ræðsla nøkur fólk hava?

Hvat er at ræðast?

Vit hava so nógvar møguleikar at finna fakta fram um ymisk evni í dag. Tí eru míni ráð til tykkum ræddu: Kunnið tykkum um evnið, so tit ikki í býttheit gera næstanum fortreð.

Vit mugu krevja av løgtingsmonnum, at teir eru sína uppgávu vaksir og taka hetta í álvara, so diskriminatiónslógin eisini kemur at umfata kynsliga orientering. Hetta er einki minni enn teirra skylda.

Tað er at fegnast um, at fleiri teirra nú siga seg vilja taka undir við, at diskriminatiónslógin eisini skal fevna um sexuella orientering. Teir taka ábyrgd.

Eg fari so inniliga at heita á restina av tingmonnunum, sum enn eru ímóti, at hugsa seg um og broyta støðu. Hvussu kunnu tit liva við og forsvara, at okkara lóggáva skal vera verri enn í londunum kring okkum? Tað er stór vanærulig skomm!!!

# *Heimurin og samkoman*

*Guds samkoma gekk sína beinu leið,*
*langt burtur frá heimsins slóð,*
*og heimurin sjangraði síni løg,*
*men hon sang eitt heilagt ljóð.*
*„Rætt mær tína hond,“ rópti kátur hann,*
*„vit skulu jú somu leið.“*
*Men hvítu hond sína fjaldi hon*
*og svaraði avgjørt: „NEI.“*

*2. „Ájú, bert ein stuttan tein, kom við!“*
*Nú røddin var mild og blíð.*
*„Her vegurin slættur og góður er,*
*og sólin her skínur fríð.*
*Eg gangi á breiðum dygdarveg,*
*og víð eru grind og lið,*
*jú, gaman er í hjá okkum báðum*
*at fylgjast lið um lið.“*

*3. Hon rætti nú út sína hvítu hond,*
*sum smæðin hon snúði sær á.*
*Hann hondina tók, tey fylgdust so,*
*og ljódliga mælti hann tá:*
*„Í betri klæðum eg fegin teg sá;*
*eg perlur tær geva skal,*
*fínt floyal og silki og gimstein í hár,*
*tað fer tær at klæða væl.“*

*4. Sín snjóhvíta búna hon skammaðist við*
*– hon saman við heimsins hann bar,*
*og rodnandi hugdi í eygu hans inn,*
*sá hitt spottandi smílið, har var.*
*„Eg fari í hatta,“ helt samkoman tá.*
*„Hatta fína, jú, eg taki av!“*

*5. Og búnan hin hvíta hon blakaði burt,*
*læt seg í tað, sum heimurin gav:*
*hitt dýrasta silki, hitt fínasta lín*
*við gimsteinum, perlum á.*
*Og prýtt var høvdið, hitt vakra hár*
*í túsundtals purlum lá.*

*6. „Tann kroysan, tú býrt í, er als ikki góð,*
*men borg eg skal byggja til tín.*
*Har innbúgv skal vera av fínasta slag*
*og teppi og gluggatjøld fín.“*
*So stoltur var heimur, tá hann henni gav*
*eitt vakurt, eitt glitrandi heim,*
*har saman við sonum og døtrum hon nú*
*væl hugna sær kundi við gleim.*

*7. Nú leikur og rómur í høllum fór fram,*
*og heimur við børnum har var.*
*Við látri og tónleiki hugnaðust tey*
*– og einki var bønarhald har!*
*„Eg synd tína kenni,“ so syrgin hann var,*
*hin náðinnar eingil, har fleyg.*
*Tá suffandi samkoman vendi sær á.*
*„Ja, børn míni – hvar eru tey!“*

*8. „Tínir talarar, bersøgnir eru teir“*
*– nú harmur var rødd hans í,*
*„míni kæru børn, teir jú ræða tey,*
*teir hoyra til farna tíð.*
*Teir tala um pínu, um svávul og eld*
*og neyð, ið ei enda fær,*
*um pínustað, sum nú á okkara tíð*
*ei nakar kann hugsa sær.*
*Eg senda skal nakrar av betri slag,*
*teir tala so stuttligt og væl.*
*Teir siga: Nú ein og hvør ger, sum hann vil,*
*hann enda í Himli tó skal.“*

*9. Nú heimsins børn fylgdust hennara við*
*í vinskapi, tvey og tvey,*
*so bert tann Harri, ið kennir alt,*
*kann skilja ímillum tey.*
*Og samkoman setti seg niður í frið:*
*„Nú eri eg mett og so rík;*
*ja, nú skal eg dansa og stuttleika mær*
*og vera heiminum lík.“*

*10. Við fragd tá heimurin vendi sær burt:*
*„Nú samkoman fallin er;*
*og einasta, hon kann rósa sær av,*
*er skommin so opinber.“*

***Matilda C. Edwards.**
**(Sigurd Berghamar týddi)**

# *Búfuglar*

*Ljómandi grágásaflokkur*
*yvir Klingurstjørn –*
*flytifuglur horvin er.*

*Heystvindar*
*oman millum Eysturskarð –*
*blæsandi yvir fólnandi lyng.*

*Sveimandi búfuglur –*
*oftast lítið hugsað um teg –*
*trúfesti títt til oyggjar okkara er.*

**Viggo Olsen**